# NUM





## ... og so gekst teimum donsku

**Renée Toft Simonsen** *var nógv brúkt sum modell í 1980-unum. Hon vann kappingina "Face of the 80's" í 1982 og helt saman við John Taylor úr bólkinum Duran Duran. Tá modellkarrieran fór at halla, búsetti hon seg í heimbýnum Århus og las sálarfrøði á universitetinum. Seinastu árini hevur hon skrivað barnabøkur, sum hon hevur vunnið fleiri virðislønir fyri. Hon er gift við sangaranum Thomas Helmig, og saman hava tey eitt barn. Renée eigur eisini tvey børn frá fyrr av.*

**Helena Christensen** *kann roknast ímillum tær heilt stóru supermodellirnar frá 1990-unum. Mamma hennara eru úr Peru, og pápin er dani. Hon gjørdist Miss Danmark 1986 og flutti síðani til París, haðani hon arbeiddi sum modell í nógv ár. Seinastu árini hevur Helena Christensen starvast sum fotografur og sum sniðgevi. Millum annað hevur hon gjørt vistfrøðilig barnaklæði til "Name It". Helena eigur ein son, 10-ára gamla Mingus.*



## NAOMI CAMPBELL

**Aldur**: 39 ár
**Familja**: Sjeikurin Vladislav Doronin, 47
**Starv**: Starvast sum modell og hevur sítt egna luktilsi
**Bústaður**: London og Moskva.

### Fyrsta myrka supermodellin

Naomi Campell er kend fyri tvey ting - at vera fyrsta myrka supermodellin og fyri sítt illsinni.

Hóast hon er 39 ára gomul, stendur hon seg enn í kappingini við tær ungu modellirnar. Hon byrjaði sína yrkisleið sum modell í heimbýnum London, tá hon var 15 ár. Í 1988 var hon fyrsta myrka modellin, sum kom á forsíðuni á franska blaðnum Vogue.

Naomi hevur haft nógvar trupulleikar við rúsevnum, og meðan modellkarrieran hevur gingið væl, hevur privatlívið ikki verið eins lætt. Sjeikarnir hava avloyst hvønn annan, og fleiri ferðir er hon dømd fyri at hava sligið fólk, sum hava arbeitt fyri seg.

Nú livur hon saman við russiska milliarderinum Vladislav Doronin og vil giftast við honum - trupulleikin er bara, at hann longu er giftur.



## CLAUDIA SCHIFFER

**Aldur**: 39 ár
**Familja**: Maðurin Matthew Vaughn, 39, og børnini Caspar, 7, og Clementine, 5
**Starv**: Starvast sum modell fyri L'Oreal, Salvatore Ferragamo og Chanel
**Bústaður**: Garður í Suffolk, Onglandi

### Gerst mamma fyri triðju ferð

Claudia Schiffer er týsk og kemur frá eini ríkari familju í Rheinberg. Hon varð uppdagað sum modell á einum náttklubba, tá hon var 17-ára gomul. Hon líkist nógv Brigitte Bardot, og nógv vildu hava hana at gerast tann nýggja Brigitte. Gjøgnumbrotið sum modell kom, tá sniðgevin Karl Lagerfeld vildi hava hana sum modell fyri merkið Chanel.

Hon helt í nógv ár saman við gandakallinum David Copperfield, men tað var filmsleikstjórin Matthew Vaughn, ið fekk vøkru Claudiu. Tey eiga tvey børn saman, og ein av komandi døgunum kemur triðja barnið til verðina.

Claudia arbeiður enn sum modell, men er givin at ganga á »catwalkinum«.



## CHRISTY TURLINGTON

**Aldur**: 41 ár
**Familja**: Maðurin Edward Burns, 42 og børnini Grace, 7, og Finn, 4.
**Starv**: Lesur og arbeiður sum modell fyri Yves Saint Laurent og Escada
**Bústaður**: New York

### »Eg vil ikki, at dóttur mín verður modell«

Christy Turlington og merkini Calvin Klein og Maybelline vóru í nógv ár samanbundin. Myrkhærda Christy var kend fyri at vera løtt at hava við at gera, serliga samanborið við Naomi Campell. Mamma Christy er ættað úr El Salvador, og pápin er amerikumaður. Christy er fødd í Kalifornia.

Hóast at hon var at síggja allastaðni, og pengarnir rullaðu inn á bankabókina, vildi Christy nakað annað, enn at bara liva av sínum vakra andlitið. Í 1994 byrjaði hon tí at lesa filosofi og átrúnað á universitetinum í New York. Hon byrjaði við yoga og gjørdi eitt klædnamerkið við yogaklæðum.

Í 2004 hitti hon sjónleikaran Edward Burns, sum hon nú eigur tvey børn saman við. Hóast Christy enn hevur ein fót í modellheiminum, vil hon ikki, at børn hennara skulu ganga í hennara fótasporum.

– Eg vóni, at dóttur mín heldur satsar uppá eina góða útbúgving enn at gerast modell, hevur hon millum annað sagt við blaðið Daily Telegraph.

*Kelda: Aftonbladet*